DAGSINS MEINING

Landslið í leysum lofti

"Fyri føroyskan fótbólt er at vóna, at hann (landsliðsvenjarin, blaðstj.) nú fer at gera lektiur. Higartil hevur alt hingið í leysum lofti hjá honum."

Hesi orðini eigur ein av ítróttarskrivarum okkara, Jóannes Hansen, sum nú í mong ár hevur fylgt fótbóltslandsliðnum og hvørs greinar og analysur standa høgt í metum millum manna og her ikki minst millum virkin ítróttarfólk. Hesi orð hansara eiga tí at verða tikin í størsta álvara á rætta stað. Tað nyttar lítið ella einki, um nýggi landsliðsvenjarin ella fyri tað arbeiðsgevarar hansara í FSF venda deyva oyrað til.

Nú nettupp fótbólturin tykist hava fingið so stóran týdning fyri tann føroyska samleikan, har hesin nærum á jøvnum føti við mál og mentan hevur kunnað savnað okkum sum fólk, hevur kunnað fingið allar føroyingar - uttan mun til flokspolitiskan lit, trúgv ella annað – til at staðið saman sum ein maður, er greitt, at hesi orðini hjá einum av okkara frægastu ítróttarviðmerkjarum eiga at verða tikin í ramasta álvara, serstakliga millum teirra, sum vara av fótbóltinum og hava átikið sær ta stóru ábyrgd hetta er – ikki bert fyri tey fótbóltsáhugaðu men fyri alt Føroya land.

Tað er eingin loyna, at síðani føroyingar fóru uppí altjóða fótbólt, hevur hesin verið við til at marknaðarføra okkara land og tað vit liva av, fiskin. Fótbóltslandsliðið hevur verið við til at seta Føroyar á heimskortið, men tað hevur eisini verið við til at eggja ungdóminum til at brúka tíð og kreftir til hetta sunna frítíðarítrivið.

At vit nú hava fingið ein landsliðsvenjara, sum ikki tykist at taka uppgávu sína í nóg stórum álvara, er eitt alvorligt mál, ikki bert fyri hann, men eisini fyri leiðsluna í FSF og í síðsta enda fyri leiðsluna í ÍSF. Hava vit ráð til at hava ein landsliðsvenjara, sum eftir øllum at døma ikki tykist at taka uppgávu sína meira alvorliga enn hann ger í løtuni? Vit skulu um stutta tíð møta varaheimsmeistarunum í fótbólti, og hetta er einki minni enn ein sensatión fyri ikki bert føroyskan fótbólt men eisini fyri okkara lítlu tjóð sum so. Eitt heiðurligt úrslit vil hava stóran týdning fyri Føroyar. Og eitt heiðurslit úrslit fæst bert, um teir, sum skulu standa á odda, taka uppgávuna í fullum álvara. Tað kunnu teir neyvan gera, tá enn einki stig er tikið til at finna og savna spælararnar. At landsliðsvenjarin ikki hevur sæð nakran av dystunum í seinastuni, og at hann ikki hevur sett nakra fyrireiking í gongd til komandi stórdystin móti Týskalandi, er bæði ein gáta og ein skandala. Vit hava áður á hesum stað appelerað til landsstýrið um at útvega eina serstaka játtan til landsliðið til eina optimala fyrireiking til dystin móti Týsklandi, men hava helst skrivað fyri deyvum oyrum. Men hvussu skal tað vera, tá landsliðsvenjarin ikki letur hoyra frá sær. Og spurningurin er, hvat leiðslan í FSF sigur til hetta. Kann hon bara standa og hyggja at, meðan einki hendir. Her má okkurt henda beinanvegin, ella má hetta málið fáa avleiðingar fyri tey, ið ábyrgdina hava.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Áheitan á sandingar um at vakna og mótmæla!

Johan Mortensen

Tað munna vera nógv við mær, sum ógvast og harmast av at siggja, at ein alirringur (kanska ikki sóttreinsaður ?) er komin at liggja fyri teym á Sandsvág fullur av fiski. Eftir hvat ein frættir, so er handlað í sera stórum heimildarloysi:

- **Ringurin er blakaður á Sandsvág av Atla Gregersen og hansara felag Pf Fútakletti, áðrenn Vinnumálastýrið hevur skrivað loyvi**
- **Ongin umhvørvisgóðkenning er givin av Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, slíkt er eitt greitt politimál. Tekur ongin Heilsfrøðisligu Starvsstovuna í álvara longur? Slíkt niðurbrýtur autoritetin hjá hesum týdningarmikla stovni.**
- **Allarhelst hevur P Østergaard, Fiskadjóralækna ikki givið flutningsloyvi til fiskin.**
- **Sýslumaðurin er ikki kunnaður um, hvat fer fram**

Tað er torfort at skilja hví Sands bygdarráð hevur viðmælt hesi ørvitisætlan, sum onki figgjarligt ikast yvirhøvur fer at geva til Sands bygd, tvey arbeiðspláss í mesta lagi. Ein lívfiskastøð, sum ikki er tørvur á. Av óskiljandi orsøkum letur Sands bygdarráð eitt óspilt náttúruøki til gávis til Pf Fútaklett, tápuligt, fyri at siga tað diplomatiskt.

- **Sandsvág, Sandsvatn, Gróthúsvatn, áirnar, Húsavík og Dalur eru eitt ótrúliga vakurt og óspilt náttúrutilfeingi, ogn Føroya Fólks og ein av allarseinastu perlunum í Føroyum. Eitt alivirksemi har fer at hava óbótaligan skaða :**
- **Alingin fer at dálka sandin Heima á Sandi, ein hin vakrasta í Føroyum og verða hann og Mølheyggjarnr ein køstur og vágin verður dálkað av skarni, fóðurleivdum og lýsi.**
- **Skjótt fer ILA at koma í bæði alifiskin og tann villa fiskin á Sandsvatni og Gróthúsvatni, og forboð verður at fiska á hesum vøtnum. Arbeiði hjá Kunningarstovuni á Sandi og Ferðaráð Føroya verður trupult og nógv darvað. ILA á Sandsvatni fer eisini at hava ávirkan á, hvussu bøndurnir fara at sleppa av við sínar vistfrøðisligu framleiðslur.**
- **Sandoy Seafood fer ikki at kunna lýsa við framleiðslum úr ILA fríðum umhvørvi og fer tørvurin á vatni orsakað av eini lívsfiskastøð at darva Sandoy Seafood.**
- **Grind fer ikki longur at verða hildin til á Sandi orsakað av ILA smittuvandanum hjá lívfiskinum.**

<u>Sandingar kunnu enn støðga hesari ætlan við at kæra til Umhvørvisstýrið og heiti eg á sandsfólk um at gera vart við seg!</u>

Tíðin er nú búgvin til, at fólk og lokalsamfeløg tora at støðga umhvørviságangi frá einum ábyrgdarleysum alara. Ein óspilt og rein náttúra Heima á Sandi hevur meira at siga enn áhugamálini hjá Pf Fútakletti, ella hvat halda sandingar ?

Sannleikin um okkum hvítu

Vit hvítu halda okkum best at vera
Og kunna meir enn onnur gera
Hvat billa vit okkum inn
At hava so óreint sinn

Vit rændu tey svørtu úr teirra landi
Og fluttu tey bundin í bandi
Í okkara egnu lond
Og slitu teirra familjubond

Tey blivu seld sum trælir
So teir hvítu kunnu vera sælir
Alt hart arbeið tey skuldu gera
Tí tey hvítu fín skuldu vera

So nógv ár eru liðin
Síðan tann svarti var sligin
Men enn í dag vit siggja
Hvít, tey svørtu skíggja

Ófatuligt, hvat hatur til kann føra
Hetta kann gera meg púra øra
Særd og dripin í hópatal
Tey hvítu vóru líkasæl

Húðalitur, hvat hevur tað at siga?
Bið tey hvítu gera so væl og tiga
Skamma seg tey máttu
Og umborið, sum tey áttu

Elska næsta tín sum sjálvan teg
Sigur orðið, ja eisini við teg
Hugsa teg um áðrenn tú dømir
Og vita um tað seg ikki sømir

Tóra Joensen, Leirvík

Ikki talan um nøs

Í blaðnum leygardagin vóru vit so ósketnir á forsíðuni at skriva, at aðalstjórin í Mentamálastýrinum hevði fingið eina nøs frá lógmanni fyri handfaring av samráðingum um yvirtøku av kirkjuni. Hetta er ikki beint og vilja vit tí koma við eini treytaleysari umbering til Petur Petersen fyri hetta okkara mistak.

Blaðstjórin

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Samstarv oftast lykilin til framgongd

Tað eru vinnan, ferðafólk, bilar og samferðslan við Norðoyggjar tað snýr seg um, og ikki um eg "eri nøgdur ella ónøgdur" við strandferðslustjóran.

Seinasta leygardag høvdu Sosialurin og eg samrøðu um eitt og annað, sum Reidar Nónfjall stjóri á Strandferðsluni hevði sagt um truplu ferðsluna um Leirvíksfjørð.

Eg helt og haldi, at ein yvirskrift sum "Nónfjall enn í starvinum - meðan vinnan situr í saksinum", hevði verið meiri í tráð við innihaldið. Hinvegin metti blaðið at betur ljóðaði yvirskriftin: "Jógvan við Keldu stak ónøgdur við strandferðslustjóran".

Spurningurin um "eg eri nøgdur ella ónøgdur", hevur ikki tann stóra týdningin, meiri áhugavert er, hvussu samferðsluviðurskiftini eru fyri vinnu, ferðafólk og bilar.

Men lat hetta fara. Fjølmiðlafólk eru náttúrliga serkøn á teirra øki.

Nónfjall og Norðoyatunnilinum

Heldur fari eg at gera nakrar viðmerkingar til, nakað av tí sum Nónfjall stjóri sigur í sínum viðmerkingum, og sum eg roknið við, at allir norðingar, politikarar og kundar annars hava ilt við at skilja.

Fyri tað fyrsta siugr hann, at tað ganga fimm til átta ár áðrenn fasta sambandið er veruleiki millum Eysturoynna og Klaksvíkina.

Møguliga hevði tað verið úrslitið, um hesin hevði avgerandi orðið í hesum máli. Hinvegin hevur okkara ferðslumálaráðharri og stjórin fyri Norðoyatunnilin sagt so seint sum nú í summar, at arbeiðið verður boðið út í hesum árinum, og tekur trý ár at gera. - Hetta er sjálvandi galdandi, um einki serligt ókent vandamál stingur seg upp.

Trý ára "langtíðarætlan"

Í øðrum viðfangi sigur stjórin á Strandferðsluni, at trý til fimm ár er langtíðarætlan hjá teimum.

Innan kunningartøkni eru trý ár long tíð, men hugsa vit um, at Suðuroyarskipið tekur trý ár at byggja, tunnilin tað sama og eitt nú at vegir skulu útbyggjast, so ber ikki til at siga, trý ár er langtíðarætlan. - Ja skilji hvør í skilja vil.

Eingin veit alt

Í triðja lagi sigur hann í viðmerkingunum hjá sær, at orsøkin til at hann tók síni fólk úr sokallaða "Leirvíksfjarabólkinum" í 1998 var, at hesir "komu ov langt inn á teirra (strandferðslunnar) arbeiðsøki". Tað vildi hann "ikki finna seg í".

Tað vil siga, at tey sum vanliga nýta strandferðslutænstuna, skulu onga meining hava, og stjórin "finnur seg ikki í", at tey hava nakra meingin, og eingin uttan stjórin sjálvur og tey fólk, sum eru uttan um hann, skulu kunna geva til kennar síni sjónarmið. - Vit skulu minnast til, at hesi fólk verða útskift helst við tvey til trý ára millum-bili, so tað er avmarkað, hvat tey kunnu vita um viðurskiftini. So tað er møguliga hetta sum gevur honum rættin til at siga, at trý ár er langtíðarætlan.

Hetta vísir støðið

So leggur sjórin til síðst dent á, at eg havi atkvøtt ímóti avloysaraskipi.

Hetta vísir eina veikliga síðu av stjóranum, sum situr beint undir samferðslumálaráðharranum. - At ein minniluti í tinginum, sum ikki fær meiriluta fyri einum avloysaraskipi leggur málið fram, er teirra sak, men at stjórin á Strandferðsluni leggur seg upp at tílíkum, sigur eitt sindur um støðufestið ella kontinuitetin hjá honum. - Hann hevur í hesum umfari skyldu til at halla sær upp at ferðslumálaráðharranum.

Fyri nøkrum árum síðani las eg lívsøguna hjá Andrew Carnegie. Um eg minnist rætt, stendur nakað soleiðis á gravsteininum hjá honum: "Her liggur ein maður, sum gjørdist til tað hann varð, tí hann samvirkaði við fólki, sum vitsti betri enn hann". - Hesin vitsti hóast alt "nakað". Møguliga er tikið nakað dýran til í hesi sammeting.

Eg fari tí enn einaferð at heita á Reidar Nónfjall, stjóra á Stranferðsluni, at finna samstarv við fólkið, sum dagliga nýta hesa kundatænastu, so at ein tílíkur arbeiðs-bólkur aftur fæst at virka. Støðan er óúthaldilig. - Tað er eingin skomm at samstarva við fólk, sum vita nakað um viðurskiftini. Arogansa loysir einki vandamál.

Lykilin til framgongd fæst oftast v
Jógvan við Keldu, tingmaður og formaður í Vinnulívsráðnum í Klaksvík:

Samstarv oftast lykilin til framgongd

Tað eru vinnan, ferðafólk, bilar og samferðslan við Norðoyggjar tað snýr seg um, og ikki um eg "eri nøgdur ella ónøgdur" við strandferðslustjóran.

Seinasta leygardag høvdu Sosialurin og eg samrøðu um eitt og annað, sum Reidar Nónfjall stjóri á Strandferðsluni hevði sagt um truplu ferðsluna um Leirvíksfjørð.

Eg helt og haldi, at ein yvirskrift sum "Nónfjall enn í starvinum - meðan vinnan situr í saksinum", hevði verið meiri í tráð við innihaldið. Hinvegin metti blaðið at betur ljóðaði yvirskriftin: "Jógvan við Keldu stak ónøgdur við strandferðslustjóran".

Spurningurin um "eg eri nøgdur ella ónøgdur", hevur ikki tann stóra týdningin, meiri áhugavert er, hvussu samferðsluviðurskiftini eru fyri vinnu, ferðafólk og bilar.

Men lat hetta fara. Fjølmiðlafólk eru náttúrliga serkøn á teirra øki.

Nónfjall og Norðoyatunnilinum

Heldur fari eg at gera nakrar viðmerkingar til, nakað av tí sum Nónfjall stjóri sigur í sínum viðmerkingum, og sum eg roknið við, at allir norðingar, politikarar og kundar annars hava ilt við at skilja.

Fyri tað fyrsta siugr hann, at tað ganga fimm til átta ár áðrenn fasta sambandið er veruleiki millum Eysturoynna og Klaksvíkina.

Møguliga hevði tað verið úrslitið, um hesin hevði avgerandi orðið í hesum máli. Hinvegin hevur okkara ferðslumálaráðharri og stjórin fyri Norðoyatunnilin sagt so seint sum nú í summar, at arbeiðið verður boðið út í hesum árinum, og tekur trý ár at gera. - Hetta er sjálvandi galdandi, um einki serligt ókent vandamál stingur seg upp.

Trý ára "langtíðarætlan"

Í øðrum viðfangi sigur stjórin á Strandferðsluni, at trý til fimm ár er langtíðarætlan hjá teimum.

Innan kunningartøkni eru trý ár long tíð, men hugsa vit um, at Suðuroyarskipið tekur trý ár at byggja, tunnilin tað sama og eitt nú at vegir skulu útbyggjast, so ber ikki til at siga, trý ár er langtíðarætlan. - Ja skiljið hvør í skilja vil.

Eingin veit alt

Í triðja lagi sigur hann í viðmerkingunum hjá sær, at orsøkin til at hann tók síni fólk úr sokallaða "Leirvíksfjarabólkinum" í 1998 var, at hesir "komu ov langt inn á teirra (strandferðslunnar) arbeiðsøki". Tað vildi hann "ikki finna seg í".

Tað vil siga, at tey sum vanliga nýta strandferðslutænstuna, skulu onga meining hava, og stjórin "finnur seg ikki í", at tey hava nakra meingin, og eingin uttan stjórin sjálvur og tey fólk, sum eru uttan um hann, skulu kunna geva til kennar síni sjónar-mið. - Vit skulu minnast til, at hesi fólk verða útskift helst við tvey til trý ára millum-bili, so tað er avmarkað, hvat tey kunnu vita um viðurskiftini. So tað er møguliga hetta sum gevur honum rættin til at siga, at trý ár er langtíðarætlan.

Hetta vísir støðið

So leggur sjórin til síðst dent á, at eg havi atkvøtt ímóti avloysaraskipi.

Hetta vísir eina veikliga síðu av stjóranum, sum situr beint undir samferðslumálaráðharranum. - At ein minniluti í tinginum, sum ikki fær meiriluta fyri einum avloysaraskipi leggur málið fram, er teirra sak, men at stjórin á Strandferðsluni leggur seg upp at tílíkum, sigur eitt sindur um støðufestið ella kontinuitetin hjá honum.

- Hann hevur í hesum umfari skyldu til at halla sær upp at ferðslumálaráðharranum.

Fyri nøkrum árum síðani las eg lívsøguna hjá Andrew Carnegie. Um eg minnist rætt, stendur nakað soleiðis á gravsteininum hjá honum: "Her liggur ein maður, sum gjørdist til tað hann varð, tí hann samvirkaði við fólki, sum vitsti betri enn hann".

- Hesin vitsti hóast alt "nakað". Møguliga er tikið nakað dýran til í hesi sammeting.

Eg fari tí enn einaferð at heita á Reidar Nónfjall, stjóra á Stranferðsluni, at finna samstarv við fólkið, sum dagliga nýta hesa kundatænastu, so at ein tílíkur arbeiðs-bólkur aftur fæst at virka. Støðan er óúthaldilig. - Tað er eingin skomm at samstarva við fólk, sum vita nakað um viðurskiftini. Arogansa loysir einki vandamál.

Lykilin til framgongd fæst oftast við samstarvi.

Afturvísing

Frants Jensen
blaðstjóri

Eg ætli mær ikki út í nakað blaðkjak, og hetta verður einasta viðmerking. Men eg vil greitt afturvísa skuldsetingunum, sum koma fram í viðmerking í Sosialinum 5. juli 2002, at Trúboðin hevur eina ódemokratiska kós, at blaðið ikki loyvir øllum at koma við meiningum og atfinningum, og at blaðið tyknist at vera heldur pravdaiskt. Eingin fyrispurningur ella áheitan er komin um at fáa nevndu viðmerkingar í Trúboðan.

Telefonnarkomanur í Havnini

Hans Birgir Hansen

Eg havi verið stórbrúkari av telefon frá '79 og til dagin í dag og havi fleiri ferðir fingið slitið telefonina og fingið hana setta til aftur, tá ið ein hevur goldið fleiri stórar telefonrokningar – omanfyri 40 túsund kr. Við lántokum úr peningastovni í Havn, sum síðani er aftur goldið, tá ið foreldrini vóru á lívi. Eg fekk aftur eina slíka stóra telefonrokning áðrenn F.T. byrjaði takstlækkingar fyri nøkrum árum síðani, ið ikki klárar kappingina við telefonfelaga Kall í dag.

Eg vil alment klaga órættvísu framferð ein av fyrrverandi og núverandi telefonistum hevur fingið uppi á tænastumiðstoðini á Tinghúsvegnum í Havn.

Tað er ikki smávegis samskiftistrupulleikar ein hevur drigist við telefonistar og starvsfólk fyrst hjá F.T.L. og síðani hjá F.T. hesi seinastu árini síðani í '79.

Eg havi áður havt NMT 900 fartelefon, sum bleiv niðurtikin um ársskifti og tá hevði ein heypt sær nýggja GSM-fartelefon og ein hevur nýtt nógv korttelefonir.

Eg siggi, at munur verður gjørdur á fastnettelefonfelagum og GSM-telefonfelagum við og uttan telefonrokning, ið ein væntandi vil klaga eftir ólavsøku.

Eg haldi tað vera gott, at telefonfelaga Kall hevur fingið keypt samskiftisútgerð frá samstarvsfelaga hjá F.T. í Svoríki verður klár at taka í nýtslu í heyst.

Eg siggi, at F.T. kemur framhaldandi at missa nógv viðskiftafólk til telefonfelaga Kall, sum byrjar at bjóða GSM-fartelefontænastur eina ferð í heyst.

Tað er ikki smávegis ein hevur ringt bæði innanoyggja og uttanlands, hvørs ein mest hevur prátað við konufólk, ið ein lærir at kenna ígjøgnum telefonprát.

Tað hevur verið stórt trot á konufólki, tá ein er komin í samband við hesar, tá ein er telefonnarkoman.